Mars 2024

betri pensjón

# Íløgutreytir

# Íløgutreytir

## Innihaldsyvirlit

§1 Íløgutreytir ..... 3
§2 Tekniskt grundarlag ..... 3
§3 Allýsingar ..... 3
§4 Pensjónssamansparing í Betri Pensjón ..... 3
§5 Innliman og pensjónsinngjøld ..... 3
§6 Kostnaður ..... 4
§7 Kursir, tá ið goldið verður inn og út ..... 4
§8 Virðið á pensjónssamansparingini ..... 4
§9 Virðið á pensjónssamansparingini, tá ið tryggingartakarin doyr ..... 4
§10 Ábyrgd fyri íløgum og gongdini við pensjónssamansparingini ..... 4
§11 At skifta váðastøði ..... 5
§12 Fulltrú ..... 5
§13 Afturkeyp ..... 5
§14 Broyting í íløgutreytum ..... 5

# Íløgutreytir

## §1 Íløgutreytir

**1. stk.:** Hesar íløgutreytir eru galdandi fyri pensjónssamansparing og íløgur annars í Betri Pensjón.

## §2 Tekniskt grundarlag

**1. stk.:** Samansparing og kostnaður í samband við pensjónssamansparingina eru við hesum íløgutreytunum lagað eftir tí tekniska grundarlagnum, sum til eina og hvørja tíð er galdandi fyri Betri Pensjón, og sum er fráboðað Tryggingareftirlitinum.

## §3 Allýsingar

**1. stk.:** Í hesum íløgutreytum er tryggingartakarin tann, ið eigur pensjónsskipanina ella íløgusáttmálan.

**2. stk.:** Í hesum íløgutreytum er pensjónssamansparingin bæði ein vanlig pensjónssamansparing og ein íløgusáttmáli, hóast hesin seinni ikki er knýttur at eini pensjónsavtalu.

**3. stk.:** Eitt handilssamdøgur er eitt tíðarskeið, tá ið Betri Pensjón kann gera íløgur. Í einari arbeiðsviku við ongum halgidøgum eru 5 handilssamdøgur: frá mánadegi til týsdag, frá týsdegi til mikudag, frá mikudegi til hósdag, frá hósdegi til fríggjadag og frá fríggjadegi til mánadag.

**4. stk.:** Keypskursur er kursurin, ið ein virðisbrævapartur í einum íløgubólki verður keyptur fyri. Sølukursur er kursurin, ið ein virðisbrævapartur í einum íløgubólki verður seldur fyri.

## §4 Pensjónssamansparing í Betri Pensjón

**1. stk.:** Við pensjónsinngjøldunum ger Betri Pensjón íløgur við at keypa virðisbrævapartar í íløgubólkum. Hetta verður gjørt eftir tí váðastøði, ið tryggingartakarin velur.

**2. stk.:** Tryggingartakarin kann velja millum seks váðastøði, frá lágum váða til høgan váða. Verður einki støði valt, tá ið avtalan verður gjørd, ella um útfylta íløguavtalan er ófullfíggjað, verður pensjónssamansparingin sett í váðastøði D.

**3. stk.:** Íløgubólkarnir í pensjónssamansparingunum í Betri Pensjón eru aloftast nøkur fíggjarlig virði, ið verða umsitin uttanhýsis. Fíggjarlig virði kunnu til dømis vera partabrøv og lánsbrøv. Betri Pensjón ger eftir bestu sannføring av, hvørji virði eru í íløgubólkunum. Betri Pensjón eigur virðini, ið íløga verður gjørd í.
Tryggingartakarin hevur so statt á ongan hátt rætt at ráða yvir virðunum. Heldur Betri Pensjón, at tað loysir seg, kann Betri Pensjón harumframt uttan ávaring beina burtur ella skifta út ein ella fleiri av teimum útvaldu íløgubólkunum. Kortini skal Betri Pensjón til eina og hvørja tíð halda tær íløgureglur, sum nevndin hevur samtykt.

**4. stk.:** Betri Pensjón ber so í bandi, at inngjøld verða býtt sambært tí valda váðastøðinum og áramálinum, ið eftir er, til tryggingartakarin verður pensjóneraður. Hevur kursgongdin í íløgubólkunum við sær, at býtið broytist, ger Betri Pensjón eina endurjavnviging, sum merkir, at býtið verður endurskapað. Endurjavnviging verður vanliga framd eina ferð um mánaðin.

**5. stk.:** Hvussu nógv pensjónssamansparingin er verd, og hvussu stór pensjónsútgjøldini eru, veldst um hvussu gongdin er í teimum íløgubólkunum, ið pensjónspeningurin er lagdur í (sí eisini §8 og §9).

**6. stk.:** Tilhoyrandi bólkin "Lánsbrøv" kunnu vera aðrar ognir, sum hava líknandi eyðkenni sum lánsbrøv. Hetta kann til dømis vera útlán.

## §5 Innliman og pensjónsinngjøld

**1. stk.:** Pensjónsinngjøld verða sett í íløgur, ið galda frá 1. bankadegi í mánaðinum. Hetta er tó treytað av, at Betri Pensjón hevur móttikið og skrásett inngjaldið í seinasta lagi tveir bankadagar áðrenn 1. bankadag í mánaðinum. Verður inngjaldið móttikið og skrásett seinni, verður tað sett í íløgur frá 1. bankadegi í komandi mánaði. Frá tí, at avtalan er gjørd, til samansparingin verður sett í íløgur, rentar kontan við rentustiginum fyri innlán.

**2. stk.:** Er inngjaldið seinkað orsakað av umstøðum, sum Betri Pensjón onga ávirkan hevur á, kann Betri Pensjón ikki verða ábyrgjað fyri fíggjarligan miss, ið seinkingin hevur elvt til. Betri Pensjón ger síðan íløguna skjótast gjørligt eftir, at tað, sum forðar gjaldingini, er burtur; hetta soleiðis, at íløgan verður galdandi í seinasta lagi 1. bankadag í komandi mánaði.

# Íløgutreytir

### §6 Kostnaður

**1.stk.:** Kostnaður, sum er partur av tí, ið er roknað út í sambandi við teknisku kontuna til pensjónssamansparingina, sæst í tekniska grundarlagnum, sum til eina og hvørja tíð er galdandi. Eisini kann serligur kostnaður verða kravdur í sambandi við, at íløgur, sum eru grundarlag undir úrtøkuni í pensjónssamansparingini, verða broyttar, og í sambandi við mánaðarligu endurjavnvigingina. Umsitingarkostnaður verður tikin av kontuni hvønn mánað. Harumframt verða kostnaðir sum íløgubólkarnar og røktarar krevja eisini álagdir (sí stk. 3).

**2.stk.:** Prísirnir samsvara við tekniska grundarlagið. Prísirnir galda eitt ár í senn og verða fráboðaðir Tryggingareftirlitinum. Prísirnir kunnu uttan serliga fráboðan verða brúktir bæði í sambandi við galdandi og nýggja pensjónssamansparing.

**3.stk.:** Kostnaðurin av, at Betri Pensjón ger íløgur í íløgubólkar, verður tikin av avkastinum, áðrenn tað verður sett inn á pensjónssamansparingina. Kostnaðurin verður ásettur við ársbyrjan. Við árslok verður hetta hildið upp móti veruliga kostnaðinum í árinum. Hetta gevur eina afturbering, ið pensjónskundar hjá Betri Pensjón fáa aftur sum avkast.

### §7 Kursir, tá ið goldið verður inn og út

**1.stk.:** Tá ið íløgur verða gjørdar í sambandi við, at tryggingargjøld, innskot og annað verður goldið inn, verður keypskursur brúktur. Møgulig vekslisamsýning kann verða drigin frá.

**2.stk.:** Tá ið pensjónssamansparingin verður goldin út, tí at tryggingartakarin verður pensjóneraður, ella tí at afturkeyp verður framt, verður sølukursur brúktur.

### §8 Virðið á pensjónssamansparingini

**1. stk.:** Hvussu nógv pensjónssamansparingin er verd, og hvussu stór pensjónsgjøldini eru, er treytað av gongdini í teimum íløgubólkunum, sum pensjónsvirðið er lagt í. Hetta verður roknað mánaðarliga. Virðið á pensjónssamansparingini, er samlaða virðið í framdu íløgunum. Hetta virðið sæst við at rita inn á *Mín Pensjón* á heimasíðuni hjá Betri Pensjón, ella verður útflýggjað, við at venda sær til Betri Pensjón. Hvussu gongdin er í virðinum, sæst í ársfrágreiðingini hjá Betri Pensjón.

**2. stk.:** Virðið verður ásett við støði í sølukursum.

**3. stk.:** Tá kundin gerst pensjónist, verður pensjónin gjørd til eitt útgjald, og rentar við einum ásettum váðastøði. Ynskir kundin at broyta váðastøði, kann hetta gerast sambært §11.

### §9 Virðið á pensjónssamansparingini, tá ið tryggingartakarin doyr

**1.stk.:** Verður pensjónssamansparingin goldin út í sambandi við deyða, verður hon uppgjørd tann 1. í mánaðinum eftir, at tryggingartakarin doyr.

### §10 Ábyrgd fyri íløgum og gongdini við pensjónssamansparingini

**1.stk.:** Tað, sum eyðkennir pensjónssamansparingar í Betri Pensjón, er, at virðið í pensjónssamansparingini og komandi pensjónsveitingum er treytað av gongdini í sambandi við íløgurnar, sum eru gjørdar í avtaluskeiðnum.

**2.stk.:** Betri Pensjón kann hvørki verða ábyrgjað fyri, hvussu tað gongur við pensjónssamansparingini ella úrtøkuni í avtaluskeiðnum, ella hvussu stór pensjónsveitingin verður, tá ið avtornar. Hetta er galdandi, hóast pensjónssamansparingin ella pensjónsveitingarnar í ringasta føri kunnu falla burtur vegna vánaliga gongd í sambandi við úrtøkuna, ið stendst av framdu íløgunum.

**3.stk.:** Betri Pensjón kann ikki verða ábyrgjað fyri møguligan fíggjarligan miss, orsaka av at endurjavnviging ikki kann verða framd rættstundis, ella at váðastøðið verður broytt. Hetta er tó bert galdandi, um orsøkin er umstøður, sum Betri Pensjón onga ávirkan hevur á.

# Íløgutreytir

## §11 At skifta váðastøði

**1. stk.:** Tryggingartakari kann til eina og hvørja tíð skifta valt váðastøði.

**2. stk.:** Verður annað váðastøði valt í sambandi við pensjónssamansparing í Betri Pensjón, fevnir broytingin bæði um komandi inngjøld og virðið, sum longu er spart saman.

**3. stk.:** Verður annað váðastøði valt, ávirkar hetta støðuna frameftir. Broytingin skal fara fram á tann hátt, at tryggingartakarin skiftir váðastøði við at rita inn á *Mín Pensjón* umvegis heimasíðuna hjá Betri Pensjón ella við at senda Betri Pensjón eina nýggja og undirritaða íløguavtalu.

**4. stk.:** Verða broytingar framdar, bindur Betri Pensjón seg til at fremja íløgurnar 1. bankadag komandi mánaðin eftir, at Betri Pensjón hevur fingið nýggju íløguavtaluna, uttan so at serstakar treytir eru galdandi fyri íløguavtaluna ella valdu íløgubólkarnir. Verður íløgan framd seinni, verður íløgan galdandi við endan á 1. handilsdegi í mánaðinum. Er seinkingin íkomin orsakað av umstøðum, sum Betri Pensjón onga ávirkan hevur á, kann Betri Pensjón ikki verða ábyrgjað fyri fíggjarligan miss, ið seinkingin hevur elvt til. Betri Pensjón ger síðan íløguna í seinasta lagi 1. handilsdag í komandi mánaði eftir, at tað, sum forðar gjaldingini, er burtur.

**5. stk.:** Broytan av váðastøði kann verða fevnt av vanligum handilskostnaði sambært tí tekniska grundarlagnum, ið til eina og hvørja tíð er galdandi, og er fráboðað Tryggingareftirlitinum.

**6. stk.:** Betri Pensjón sendir tryggingartakaranum eina váttan um, at broytingin er gjørd.

## §12 Fulltrú

**1. stk.:** Tryggingartakari kann geva einum øðrum persóni skrivliga fulltrú til at velja váðastøði, tá ið ein pensjónssamansparing í Betri Pensjón verður stovnað. Henda fulltrú kann eisini fevna um heimild at skifta váðastøði í samansparingarskeiðnum.

**2. stk.:** Betri Pensjón skal hava skjal, ið prógvar møgulig viðurskifti, sum snúgva seg um fulltrú.

## §13 Afturkeyp

**1. stk.:** Tryggingartakarin kann í ávísum førum keypa pensjónssamansparingina aftur sambært galdandi lógum. Í sambandi við afturkeyp kann tryggingartakarin ikki krevja at fáa íløguognir útflýggjaðar heldur enn at fáa peningaliga uppgerð framda, tí virðini eru ogn hjá Betri Pensjón. Afturkeyp verða framd 2. bankadag í hvørjum mánaði.

## §14 Broyting í íløgutreytum

**1. stk.:** Hesar íløgutreytir kunnu verða broyttar av Betri Pensjón við 30 daga freist til mánaðarlok.
Nýggjastu og harvið galdandi íløgutreytirnar eru tøkar á heimasíðuni hjá Betri Pensjón.

Betri Pensjón
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn
V-tal: 563609
telefon: +298 348 700
heimasíða: www.pensjón.fo
t-postbústaður: betri@pensjon.fo